Føroyskt blað
sosialurin

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Fyritaksstjóri: Krisjan Dahl
Ljósmyndari: Kalmar Lindenskov

Blaðfólk: Randi Jacobsen
Dagny Joensen
Hilmar Jan Hansen
Jóstinus Eldesgaard

Útgevari, uppseting og prent: P/I Sosialurin
Bústaður: Argjavegi 28
Argjum

Postadr.: Postsmoga 78
110 Tórshavn
Telefon: 11820
Telefax: 14720

Verjið lívsgrundarlagið

Oddagrein

GRUNDHUGSJÓN javnaðarfloksins er at tryggja lívsgrundarlag og livilíkindi fyri vanlig fólk.

HINVEGIN er kapitalistiska sjónarmiðið »Vertin á hvat annar fær, eg skal nøra mær«.

HETTA eru ørindasveinar kapitalismunnar, – onkur kallar tað løtuvinningsfólkið.

HESIR umsótu okkara fiskivinnupolitikk frá 1975 til 1993. Teir vóru altíð klókast, lurtaðu ongantíð eftir nøkrum ráðum frá øðrum. Úrslitið var oyðilagdir grunnar, einki lívsgrundarlag, skuld, tvingsilssølur. Rokningina til vanliga fólkið.

UM skomm var skapt í teimum, so kluvu teir ikki í tvey aftan á eina slíka »fiasko«.

MEN gakk, nú leggja teir á aftur.

FISKASTOVNARNIR eru so dánt við at koma fyri seg og nú skulu grunnarnir aftur tømast. Reiðarin skal ráða, hann skal hava, hann skal ótálmaður umsita *okkara* lívsgrundarlag, sum hann vil til egnan og kapitalsins fyrimun.

JAVNAÐARFLOKKURIN eigur at siga nei til slíka gongd. Handan leiðin er roynd fyrr.

VIT sita við rokningini og krevja, at politikarar floksins syrgja fyri, at tað er nóg mikið við rokningum fyri tápuligheitir frá hasum »kompanínum«.

TAÐ er rætt at varskógva nú, tí søgan vísir, at strámenninir hjá kapitalinum altíð hava havt meiriluta í tinginum tvørtur um floksmørk.

TEIR fingu loyvi til at niðurbróta okkara livandi tilfeingi. Tá einki var eftir har, fóru teir eftir danska tilskotinum, ið var ætlað til sosialar trygdarskipanir, og nýttu meginpartin av hesum í teirra egnu studningsmyllu, inntil danir søgdu stopp og alt kollsigldi.

JAVNAÐARFLOKKURIN spældi ov nógv við tá.

NÚ mugu vit vísa, at flokkurin hevur lært av mistøkum.

FLOKKURIN má tora at standa fastur uppá ein skynsaman stovnsrøktarpolitikk og ikki tillaga sínar avgerðir eftir meir og minni populistiskum SvF-journalistikki.

Sosialurin

lesarabrøv

Viðmerkingar til Jógvan við Keldu í Norðlýsinum: Rætt ella skeivt?

Tá eg 9. juli heitti á Atla Hansen, løgtingsmann, um at kalla grein 18 nevndina saman, so var tað fyri at **lýsa leiklut landsstýrisins í hesum máli.** Tíðindini í Útvarpinum um at løgmaður var farin niður til Kastrup at beita Richard Mikkelsen eftir Jóhan Páll Joensen, nevndarformanni í Føroya Banka, gjørdu meg ivasaman. Landsstýrið skuldi sjálvandi finna ein syndabukk fyri at fyrsvara sítt dugnaloysi.

Tað, sum kundi tykjast løgið er, at Uhrenholt, sum var settur sum nevndarformaður í Faroe Seafood av Danske Bank, næstan ikki er nevndur av landsstýrinum. Hjá landsstýrinum er tað sum orðatakið sigur: *Bert lúsin útlendsk er, hon ongan skaða ger.* Løgmaður og Jóannes Eidesgaard áttu at vitað, at tað var Den Danske Bank, sum átti meginpartin av fíggingini í dótturfelagnum í Grimsby, saman við Hambros Bank og Føroya Banka.

Tí kann tað vera rættuliga ivasamt, hvussu stóra ávirkan J.P.J. hevur havt á søluna í Grimsby. Tað kundi líka so væl hent, um J.P.J. ikki var við í keypinum í Grimsby, at tað var Uhrenholt saman við íslendingum, sum stóð eftir við virkinum.

Tað gongur sum ein reyður tráður fígjøgnum alt tað sum hendir, at danir hava ætlan um at avmontera Føroyar.

Tá eg vildi sleppa at kanna leiklutin hjá landsstýrinum í sambandi við at Framtaksgrunnurin verður brúktur til at bjarga rovunum av Faroe Seafood, so var tað tí at løgmaður ikki er hvør sum helst í hesum samanhangi. Hann er fyrrverandi nevndarlimur í Faroe Seafood, fyrrverandi nevndarlimur í Føroya Fiskavirking, og sum rosinan í pylsuendanum, fyrrverandi stjóri á rækjuvirkinum á Oyri. Tað kann eisini vera rættuliga ivasamt, um tað er rætt av Framtaksgrunninum at seta 50 milliónir í Faroe Seafood Prime.

Grein 18 nevndir kunnu bert kanna møgulig óreglulig politisk og umsitingarlig viðurskifti.

Tí er tað burturvið av Jógvani við Keldu at leggja meg undir at hava lopið umtalaða vinnulívsmann í ryggin. Henda ákæra kemur bert av óndskapi og lítlari vitan.

Tann kaldi veruleiki er tann, at tað er Jógvan við Keldu, sum er lopin í ryggin á Heina O. Heinesen. Tað skal eisini góð frágreiðing til, um tú ikki eisini ert lopin í ryggin á umtalaða vinnulívsmanni, fyri at brúka tíni egnu orð. Tú sigur, at tú ert hvørki fyri ella ímóti, men tú vilt gjarna leggja lok á opinleikan í keypinum.

Fuglasongur og onkrir siga

Tú spyrt um nakað veruligt er aftan fyri fuglasongin og onkrir siga?

Hetta er fyrst og fremst tað, sum hevur verið frammi í Útvarpinum og Sjónvarpinum, og nú eisini í bløðunum.

Síðani spyrt tú meg, um nakar føroyingur var klárur at keypa Faroe Seafood í Grimsby? Henda spurning ynskja allir klaksvíkingar svaraðan.

Ja, um teir fingu somu møguleikar sum Úhrenholt.

Tað einasta ljóspunkt í hesum keypinum er, at J.P.J. stendur eftir við 25% av virkinum. Um hann við hesum kann betra um úrslitið á Kósini, hevur hetta stóran týdning fyri Klaksvíkina og alt umráðið her norðuri. Um so ikki er, kann tað gera tað sama fyri Klaksvíkina hvør eigur virkið í Grimsby. Bara tað vóru føroyingar, sum áttu meirilutan.

Hvat Heini hevði gjørt, um bretar ella íslendingar fóru avstað við fyritøkuni? Tann kaldi veruleikin er tann, at tað eru íslendingar saman við einum dana, sum eitur Uhrenholt eitt ella annað.

Tað er kanska riddarakrossurin hjá býráðsformanninum, sum ger at hann hevur betri álit á dønum enn føroyingum.

Nú er so bert eftir at vóna, at Jóhan Páll Joensen hevur ta ávirkan á virkið í Grimsby, sum hann sigur seg hava.

Hetta virkið er einasta brúgvarhøvd, sum føroyingar hava havt á bretska meginlandinum.

At hetta hevur stóran týdning fyri føroyskan fiskaútflutning skal eingin ivi vera um. Hetta gevur føroyingum: Marknaðaratgongd – Marknaðarkunnleika – harafturat Know how – Goodwill og virðing uttanlands.

Heini O. Heinesen,
løgtingsmaður

Tey súru berini

Revurin rakk ikki upp eftir berunum. Tey eru súr, segði hann tá. Eg skoyti ikki um tey. Hatta rann mær í huga, tá eg las málteigin nú seinasta leygardag. Har var greitt frá bók, tveir lærdir menn í Danmark hava skrivað um fremmanda orð í málinum danska. Jú, har tróta ikki fremmand orð. Onkur annar Danskari, lærdur maður eisini, helt so fyri einaferð, at vórðu øll fremmandu orðini pilkað burtur úr donskum, var mestsum onki mál eftir. Men hesir báðir láta væl at, tað er gongda leiðin og eggja øðrum at ganga sama veg. Teir hava hug at gera gjøldur burtur úr onkrum, ið royndi at fjálga um og varðveita gamla málið. Danskt er farið so langt av leið, at har er so statt sum Viderø segði, tá ið hann kom aftur úr Egyptalandi: »Egyptin vil helst sita so nær jørðini sum møguligt, hann vil helst sita á jørðini við fuglinum í aðrari hondini og slíðraknívinum í hinari, men so skrikti Nasser hann upp við slíkari ferð, at »har var eingin vegur tilbakar«

Soleiðis er hjá dønum og málinum, nú fáa teir ikki vent aftur. Og tí siga teir sum revurin: gamalt mál er súrt.

Men málteigaskrivari Sosialsins, hann er so hjartaliga í parti við hasum dønunum, og vil hava okkara mál fylt við fremmandum orðum eisini. Men hvussu verður tá vorðið við máli okkara? Verður ikki tí tá eisini feigdin fyri? Men tað er kanska tað teir ætla, hasir speireikandi og spottandi pennarnir,ið nú skriva málteigin í Sosialinum?

Harmur

Sjónvarpið, sannleikin og lygnin

I fjølmiðlunum berast í hesum døgum so mangar avdúkingar, sum ikki kennast okkum á vinstravonginum sum avdúkingar men heldur sum staðfestingar. Fjølmiðlarnir siga frá um kjarnorkuvápn í Thule og um lívshættisliga Loran-stød á Eiði – og tað ljóðar, sum halda tíðindafólk hetta vera nýggj tíðindi.

Tey vita lítið!

Gjørdu tey sítt arbeiði til lítar, kannaðu tey fyrst tað skjalatilfar, sum lættast er at koma at: Føroysku bløðini serliga frá seksti-árunum, men eisini frá sjeytiárunum og áttatiárunum. Longu fyrst í 60-unum skrivaði tjóðveldispolitikarin Erlendur Patursson alt hetta, ið nú »kemur undan kavi«, í floksblaði sínum »14. September«. Hann hevði gjøgnumskoðað alt og bar sannleikan fram, og fyri tað varð hann hunddálkaður bæði í málgagni Fólkafloksins, málgagni Sambandsfloksins og ikki minst í málgagni Javnaðarfloksins.

Og sama søga hevur endurtikið seg upp gjøgnum sjeytiárini og áttatiárini: Vinstravend bløð, vinstravendir politikarar og vinstravendar fylkingar søgdu sannleikan. Íhaldsbólkurin segði ósatt.

Føroyski vinstravongurin hevur við hesum avdúkingum vunnið árvissan sigur. Vit høvdu rætt. Mótstøðufólk okkara høvdu órætt.

Tað er tí bæði hugvekjandi og ikki sørt skelkandi, at almenni stovnurin Sjónvarp Føroya á hesum sigursdegi vinstravongsins grevur fram fornleivdina Óla Breckmann at rinda til jarðar sannleika og veruleika. Og har slapp maðurin ótarnaður at seta krúnuna á sína ótýdligu útspillingarferð, sum neyvan hevur sæð sín líka, síðani Goebbels var uppi á døgum.

Vit, sum í sjeyti- og áttatiárnum gingu friðargongu gjørdu tað, tí Føroyar vóru eitt hitt fremsta bumbumál í heiminum. Vit vildu føroysku tjóðini væl.

Nú er avdúkað á hægsta stigi, at Óli Breckmann, Dagblaðið og Fólkaflokkurin umboðaðu lygnina – teir runnu ørindi fyri eitt krígsótt stórveldi og løgdu vertin á vandan, føroyska fólkið sveimaði í.

Á sigursdegi okkara gav almenna sjónvarpið lygnaranum seinasta orðið. Tað kunnu vit leggja okkum í geyma. Men søguna sjálva kann eitt neyðarsligt føroyskt sjónvarp ikki reingja.

Hattaryík 15. juli 1995
Árni Dahl